


## Øll sluppu við lívinum

Øll sluppu við lívinum, tá eitt turkiskt flogfar datt niður nærhendis Schiphol-floghavnini í Amsterdam í morgun. Summar tíðindastovur siga, at eitt fólk hevur latið lív, men turkiska flogfelagið, sum eigur flogfarið, sigur, at øll sluppu við lívinum. Flogfarið, sum er av slagnum Boeing 737-800, hevði sambært fjølmiðlunum 135 ferðafólk umborð, tá óhappið hendi. Turkiskir fjølmiðlar siga, at 20 fólk fingu skaða. Flogfarið fór úr Istanbul klokkan sjey í morgun og skuldi seta seg í Amsterdam klokkan 09.40. Men stutt frá floghavnini datt tað niður. Schiphol er tann fimstistørsta floghavnin í Evropa.

# LOGOS HOPE á veg til Føroyar

**- ein flótandi føroysk sendistova**

TRÚBOÐAN
*Poul Jóhan Djurhuus*
*Gjaranes@olivant.fo*

**Nú er Gamla Norrøna, sum varð seld til trúboðarafelagsskapin OM og fekk navnabroyting til Logos Hope, á veg til Føroyar. Eftir ætlan skal hon vera her í apríl. Poul Jóhan Djurhuus og kona hansara Elsa, mamman, Hervør Djurhuus, og svágurin, Símun Fuglø, hava vitjað umborð**

Í góðveðrinum týsdagin 17. februar vitjaði undirritaði, sjálvur fjórði, umborð á Logos Hope við bryggju í Køge, sunnanfyri Keypmannahavn, har skipið hevur ligið í fleiri mánaðir, meðni tað hevur verið gjørt endaliga klárt til trúboðarasigling. Var umborð fyri einum knøppum ári síðani, tá skipið lá í Kiel í Týskalandi, og tað má sigast, at nógv er gjørt síðani. Nú er skipið liðugt at fara undir sína regluligu sigling, og umleið 350 fólk frá 50 ymiskum tjóðum bíða alspent at sleppa avstað við skipinum at gera tað arbeiði, sum tey vóru kallaði til, nevniliga at fara út í allan heimin við evangeliinum.

### Operation Mobilisation

Tað er trúboðarafelagsskapurin Operation Mobilisation (OM), sum eigur og rekur skipið. Tað eru nú gott 4 ár síðani OM keypti skipið. OM byrjaði mitt í sekstiárunum og føroyingar hava havt samband við OM øll hesi árini. Tað var tann ungi eldhugaði George Werver, sum tók fyrsta stigið til felagsskapin, og hesi seinastu 40 árini er tað ein stórur "herur" av føroyingum, sum hava gjørt sína andaligu "herskyldu" við trúboðarafelagsskapinum OM, annaðhvørt á landi ella umborð á skipunum. Tað fyrsta skipið fingu teir í 1970, sum varð kallað LOGOS. Hetta var fyrrverandi Umanak, sum mangan legði inn í Føroyum á farleiðini til ella úr Grønlandi. Trúboðaraskipið LOGOS vitjaði í Føroyum í 1983.

Húsavíkingurin, Uni Nolsøe, tók ímóti okkum umborð, og hóast hann er yvirstýrimaður og hevur nógv at hugsa um í hesum døgum, so tók hann sær góðar stundir at vera saman við okkum, vísa okkum runt og greiða frá.

### Fyrsta inntrykkið

Tað fyrsta ein sær, komin umborð, er tann innbjóðandi móttøkupulturin og móttøkuhølini. Við pultin er pláss fyri tveimum móttøkufólkum, og tey næstu árini fara milliónir av menniskjum, úr nógvum tjóðum og tungumálum, at ganga framvið móttøkupultinum. Tað sigst, at tað fyrsta inntrykkið, er tað, sum avgerð restina, og tað má sigast, at allastaðni har ein varð vístur umborð, bar tað boð um nakað nýtt, kvalitet og umhugsni. Alt er gjørt av nýggjum, so føroyingar hava nógv at gleða seg til at sleppa at heilsa uppá gomlu Norrønu, tá Logos Hope kemur til Føroyar í apríl mánaða. Tað, sum enn ikki er liðugt er tann stóri konsertsalurin/teatrið, sum liggur á gamla bildekkinum, har sum bilarnir áður koyrdu inn á dekkið. Teatrið kemur at vera útgjørt við stórum palli og nýggjastu ljóð- og ljóstøkni. Har verður pláss fyri nógvum fólki.

### Skúli og sjúkradeild

Tað eru 33 børn umborð, sum verða undirvíst av 8 lærarum, har ein av hesum átta virkar sum skúlaleiðari. Skúlastovurnar eru fleiri í tali. Tað verður undirvíst á enskum, men foreldrini hjálpa til við undirvísingini í móðurmálinum. Tey størru børnini verða eisini undirvíst yvir alnótina.




*Logos Hope við bryggju í Køge*

Sjúkradeild við læknatannlækna- og sjúkrastovum er eisini umborð á Logos Hope. Tað er eitt krav, at útbúgvin heilsufólk eru við skipinum. Við eini manning uppá 350 fólk er neyðugt við góðari heilsuútgerð. Eisini kemur Logos Hope at hjálpa til á støðum har neyðugt er við læknahjálp. Spurdur um pensjoneraðir læknar og tannlæknar, sum annars eru væl fyri, eru vælkomnir umborð, svaraði Uni, at teir skulu vera meira enn vælkomnir.

### Bókasølan

Tað mest spennandi at síggja var stóra bókasølan, við heili 7000 titlum. Her er alt slag av kristiligum bókum, bæði til børn, ungdóm og tey tilkomnu, og eisini er eitt hav av kristiligum fløgum, bæði við tónleiki og filmi. Vanligar, ikki-kristiligar, undirvísingarbøkur eru eisini ímillum bøkurnar í stóru bókasøluni, so sum landafrøði, jarðfrøði, biologi, bøkur um urtagarðsrøkt, mat, heilsu o.s.fr. Hetta tí, at skipið eisini vitjar støð, har tað er torført at fáa hendur á undirvísingartilfari. Talan er um eina bókasølu í sera snotiligum og heitum hølum, við nýløgdum skipsparketti á dúrkinum. Eisini eru hølini ljós og rúmlig. Umborð á hinum skipunum hevur tað verið vanligt, at bókasølan er sett upp og tikin niður ímillum vitjaninnar. Hetta verður ikki neyðugt umborð á Logos Hope, tí talan er um eina permanenta bókasølu. Skipini hjá OM hava altíð verið kend sum "bókaskipini," og tað er bókasølan, sum dregur tað nógva fólkið umborð, og tað er serliga ígjøgnum bókasøluna, at skipini náa fólkið við evangeliinum.

Eisini er eitt bókasavn umborð, har møguleiki er, undir friðarligum umstøðum, at sita og arbeiða. Har er eisini atgongd til fleiri teldur.

### Føroyingar umborð

Fleiri føroyingar arbeiða umborð: Umframt Una Nolsøe møttu vit Bjartu og Trúgva, sum er stýrimaður umborð, og teirra fittu børnum. Helen og Eyðun Joensen, Ragnar Joensen, Eirik Gunnarson og Gunleig Joensen. Vit ótu døgurða saman við teimum og fingu eitt hugnaligt prát um arbeiði umborð. Uni Nolsøe mynstraði sum yvirstýrimaður, tá hann kom umborð fyri einum ári síðani. Meðni skiparin og konan eru í barnsburðarfarloyvið verður Uni skipari. Hann sigur, at hetta árið er besta árið í hansara lívi. Uni vónar at vera við, tá Logos Hope kemur til Føroyar í apríl mánaða.

Eisini varð prátað við Eirik Gunnarson, sum má sigast at vera ein OM-veteranur. Hann var fyrstu ferð við OM í 1971. Í 1974 fór hann í eini lastbilakonvoy úr Belgien til New Delhi í India, har hann arbeiddi sum bilmekanikari hjá OM. Hóast Eirik er komin nær teimum seksti árunum, so er OM-neistin ikki sløknaður, tí Eirik hevur, hesi seinastu árini, mynstra heilar fýra ferðir við OM-